# Hetta kann eingin liva við

**Prísurin at sigla við Strandferðsluni er við at fara heilt av sporinum og tí má Løgtingið leggja uppí, heldur sambandsflokkurin, sum nú leggur uppskot fyri tingið**

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

Hetta kann ongin liva við. Johan Dahl í Sambandsflokkinum heldur, at nú ætlanin er at hækka prísirnar at sigla við Strandferðsluni, er príslegan við at fara heilt av sporinum.

Tí heldur hann at tað er av størsta týdningi, at vit fáa eina politiska viðgerð av prísurnum hjá Strandferðsluni og av, hvørja tænastu, Strandferðslan skal veita.

Sambandsflokkurin fer tí ein av allarfyrstu døgunum at leggja uppskot fyri tingið um at prísirnar hjá Strandferðsluni. Uppskotið er á veg í Løgtingið og verður lagt fram fyrstra dagin.

Annars er ætlanin hjá Strandferðsluni at hækka prísirnar upp í 20% í summum førum, eitt nú á siglingini ímillum Suðuroynna og Havnina.

Johan Dahl, sum er tingmaður fyri Suðuroynna og sostatt útjaðaratingmaður sjálvur, sigur, at príshækkingarnar hjá Strandferðsluni raka útjaðaran so meint, at tað kann ongin liva við, í hvussu so er ikki suðuroyingar. Hinvegin koma tey, sum búgva í miðstaðarøkinum lítið og onki at merkja.



*Sambandsflokkurin heldur at prísirnir hjá Strandferðsluni er eitt politiskt mál, tí tað hevur so stóra ávirkan á alt samfelagið. Nú leggur flokkurin uppskot fyri tingið um at forða fyri, at ferðaseðlaprísirnir hjá Strandferðsluni hækka og at teir vera javnari um alt landið*

## Fleiri hundrað krónur

Skal eitt húski úr Suðuroy til Havnar og suður aftur við bili kostar ferðin 590 krónur, tá ið annað barnið betalir hálvan ferðaseðil og hitt er eldri enn 14 ár og betalir fullan prís.

Hækkar prísurin 20% skulu tey hereftir gjalda kr. 708 krónur fyri at koma aftur og fram.

– Á øðrum sjóvegis leiðum hjá Strandferðsluni hevði prísurin hjá sama húski verið 310 krónur sum er, og 372 krónur, um prísirnir hækka 20 %.

Prísmunurin millum Suðuroyarleiðina og aðrar leiðir er sostatt 280 krónur, sum prísirnir er nú, men hækka prísirnir 20%, verður munurin heilar 336 krónur.

Til samanberingar kann nevnast, at fimm fólk í bili kunnu koyra aftur og fram ígjøgnum undirsjóvartunnilin fyri 112 krónur tilsamans, hava tey kubba við hægsta avslátri.

Johan Dahl leggur afturat, at Kloosterboer í Kollafirði kann senda fisk heilt til Kina fyri 1,04 krónur fyri kilo, men at tað kostar 33 oyru at senda hann úr Havnini til Suðuroyar.

Samstundis er tað beinleiðis inntøka hjá eysturoyingum at koyra til Havnar við Bygdaleiðum til arbeiðis, tí frádrátturin í skattinum er størri enn tað, sum ferðaseðilin kostar.

– Sostatt er skjótt at semjast um, at als ongin samanhangur er í príspolitikkinum og tí er tað alneyðugt at fáa eina politiska viðgerð av prísleguni hjá Strandferðsluni, sigur hann.

## Somu prísir

Sambandsflokkurin heldur avgjørt, at prísirnir hjá Strandferðsluni er eitt politiskt mál, tí tað hevur so stóra ávirkan á alt samfelagið.

Endamálið við uppskotinum, sum flokkurin nú fer at leggja fram, er í fyrra lagi at forða fyri, at ferðaseðlaprísirnir hjá Strandfaraskipum Landsins hækka.

Í øðrum lagi er endamálið at javnseta prísin á øllum sjóvegis farleiðum í landinum. Tað vil siga, at ferðaseðlarnir á øllum leiðum skulu kosta tað sama.

Hetta royndi flokkurin eisini í 2000, men tá varð uppskotið felt.

Grundgevingin við at fella uppskotið var, at spurningurin um ferðaseðlaprísir hjá Strandferðsluni átti at verðið tikin upp til politiska viðgerð og kannaður nærri.

Hetta kundi gerast í sambandi við, at Strandferðslan júst um tað mundi eisini var í ferð við at endurskoða prísbygnaðin.

– Men nú trý ár eru gingin, mugu vit staðfesta, at politiskt er einki hent í málinum. Og á Strandferðsluni verður sagt at tey heldur ikki eru komin longri. Somuleiðis siga tey á Strandfaraskipum Landsins, at tey ikki vita nær nakað hendir, sigur sambandsflokkurin.

Flokkurin veit ikki, hvussu nógv hetta uppskotið fer at kosta landskassanum, verður tað samtykt, tí sambært Strandfaraskipum Landsins, finnast eingi greið tøl sum vísa, hvussu nógv ferðafólk bilar og farmur eru á teimum einstøku leiðunum.

Harafturat kann roknast við einum ferðslulopi, tá ið prísirnir á ávísum leiðum lækka, og eisini vegna bøtta tænastu á Suðuroyarleiðini.

– Vit vita heldur ikki, hvørjar avleiðingar tað fær, verða prísirnir hækkaðir, soleiðis sum ætlanin er.

– Men vit vita í hvussu so er av royndum, at tað er ikki altíð, at teir hægstu prísirnir geva størstu inntøkuna.

Hugskotið um at javna prísirnar hjá Strandferðsluni samsvarar annars væl við áskoðanina, sum Hergeir Nielsen, einasti samgongutingmaður úr Suðuroynni, førdi fram í Sosialinum leygardagin.

# Kann gerast deyðadómurin yvir stórt arbeiðspláss í Vági

**– Politikkurin hjá samgonguni fer at kosta okkum eina eyka útreiðslu upp á meiri enn eina millión í ár, og tað klára vit neyvan, sigur stjórin á Palm Seafood í Vági**

AVLAGAÐ KAPPING
*Áki Bertholdsen*

**Vágur:** Ein eykaútreiðsla uppá meiri enn eina millión um árið.

Tað eru tey døpru útlitini hjá einum av størstu fiskavirkjunum í Vági í løtuni, Palm Seafood.

Petur Johannesen, stjóri, sigur, at tey eru í døpurhuga um gongdina og hann sigur, at tað verður ógvuliga ivingarsamt, um tey fara at hóra undan.

Petur Joensen sigur, at í fyrstu atløgu er flutningsstuðulin skerdur. Í øðrum lagi hevur Fiskavirking stovna serligt felag, sum skal flyta fiskin fyri eisini at fáa flutningstuðul.

– Vit hava sostatt mett, at flutningsstuðulin verður uppi í mars mánaða í ár, sigur Petur Johannesen.



*Fiskaarbeiðið í Vági er nú komið á eitt vandamikið vegamót. Petur Johannesen stúrir fyri, at tað fer ein galnan enda*
*(Savnsmynd)*

Hetta fer at koma serliga illa við hjá einum virki sum Palm Seafood, tí virkið flytir 80-90% av fiskinum, sum tað virkar, suður við Smyrli, tí hann er keyptur norðaneftir.

– Í fjør virkaðu vit 4.400 tons og av teimum fluttu vit minst 3.500 tons norðaneftir.

– Vit flyta so miki nógvan fisk, at vit eru tey í Suðuroy, sum flyta mest við Smyrli.

Sostatt fer skerdi flutningsstuðulin at merkja eina eyka útreiðslu hjá okkum uppá meiri enn eina millión og tað er ein sonn vanlukka fyri okkum.

## Ongin møguleiki

Petur Johannesen sigur, at tað kostar 41 oyru fyri kilo at flyta fisk suður við Strandferðsluni. Men tey fáa eini 24 oyru aftur í flutningsstuðuli.

– Fellur flutningsstuðulin burtur í mars, skulu vit betala 24 oyru meiri fyri hvørt kilo av fiski, vit keypa og tað sigur seg sjálvt, at tá er kappingin so avlagað, at vit hava ongan møguleika at kappast við virki aðrastaðni í landinum.

Ein trupulleiki við flutningsstuðlinum er, at upprunaliga var hann ætlaður sum stuðul til at flyta óvirkaðan fisk á virki til virkingar.

Men nú er alt møguligt komið uppí, bæði rækjur, fesk fløk, frystur fiskur av virkjum og aftur til Havnar til avskipingar.

– Tað einasta, sum ikki fær stuðul til avskipingar, er saltfiskur, sum Palm Seafood hevur mest av, men ongin kann fortelja okkum, hví tað er so.

Petur Johannesen sigur, at hetta er við teimum prísum, sum nú eru galdandi.

– Men samstundis verður boðað frá, at farmagjøldini hjá Strandferðsluni skulu hækka, so tað verður steinur omaná byrðu hjá okkum.

## Samgongan stórt vónbrot

Stjórin á Palm sigur, at hetta er eitt stórt vónbrot hjá teimum, tí hann heldur, at hetta samsvarar illa við tann málsetning, sum hendan samgongan hevði sett sær og sum er niðurfelt í samgonguskjalið. Í samgonguskjalinum stendur, at »besta grundarlagið undir samfelagnum er virksemi og trivnaður á øllum plássum í landinum« og tað stendur eisini, at »flutningskostnaður skal sum minst darva kappingarførinum hjá vinnulívinum í útjaðaranum«.

– Tí høvdu vit vónir um, at hendan samgongan fór at gera nakað veruligt við trupulleikarnar, men higartil hevur tað so verið eitt vónbrot, sigur Petur Johannesen.

Palm Seafood er eitt stórt arbeiðspláss, tí har arbeiða sjálvdan færri enn 40 fólk og arbeiðið er at kalla hvønn dag. Tí hevur virkið stóran týdning í Vági, ikki minst nú tað stóra laksavirkið hjá Hera Hjelm liggur stilt, í hvussu so er í løtuni.



# Fiskar á turrum landi í Fuglafirði

**Hátíðarlig frumframførsla av sjónleikinum, Fiskar á turrum landi, var í Mentanarhúsinum í Fuglafirði seinasta leygarkvøld**

SJÓNLEIKUR
*Vilmund Jacobsen*



*120 fólk vóru til frumframførsluna av sjónleikinum, Fiskar á turrum landi, í Mentanarhúsinum í Fuglafirði seinasta leygarkvøld.*

**Fuglafjørður:** Leygarkvøldið var frumframførsla í Mentanarhúsinum í Fuglafirði av sjónleikinum, Fiskar á turrum landi, sum fýra fólk úr Fuglafjarða Sjónleikarfelag framføra.

Hetta var ein søgulig hending, tí hetta er fyrstu ferð í eini 20 ár, at Fuglafjarða Sjónleikarfelag sýnir fram sjónleik.

Leikurin, sum er íslendskur, er skrivaður av Árna Ibsen, og hann fer fram úti á landinum í Íslandi.

Fiskar á turrum landi er bæði stuttligur og álvarsamur. Hann snýr seg um eina eldri kvinnu, sum tekur ímóti fólki til gistingar, ið koma fram við. Hon hevur ein fosturson, sum ongastaðni hevur verið og er rættiliga heimføðisligur.

Eitt ungt par kemur úr stórbýnum og gistir hjá kvinnuni. Ungi maðurin er ein sonevndur "skjalamappudrongur" við stórum framtíðarætlanum, men hann er eisini harðligur við unnustu sína, sum gongur við bláum eyga.

Tey fýra, sum framføra leikin, eru Áslakkur úr Gøtu, ið er ungi maðurin úr stórbýnum, unnusta hansara, Hanna úr Fuglafirði, kvinnan úti á landinum, Marita úr Fuglafirði og fostursonur hennara, Kenneth, sum eisini er úr Fuglafirði.

## Frumframførsla

Fuglafjarða Sjónleikarfelag hevði bjóðað 120 fólkum við til frumframførsluna leygarkvøldið. Hesi vóru umboð fyri kommununa, avvarðandi av teimum, sum framførdu, umboð fyri sjónleikarfeløg og meginfelagið, MáF.

Fólkið møtti kl. 19 til okkurt leskandi, og kl. 20 var so sjálv frumframførslan.

Eftir leikin var samkoma, har gestirnir fingu grýturætt. Hetta var ein hátíðarlig løta við røðum og øllum góðynskjum um virksemið hjá Sjónleikarfelagnum og tí stásiliga húsi, sum felagið eigur og rekur. Blómur vórðu eisini handaðar.

Teir, sum hildu røðu, vóru eitt nú Eyðun Johannesen, Hilmar Joensen, Jóan Heri Joensen vegna Fuglafjarða kommunu og Magni Poulsen, leikstjóri.

Í gjárkvøldið var aftur ein sýning kl. 20, og í kvøld verður so leikurin, Fiskar á turrum landi, sýndur fyri seinastu ferð.

Sagt verður úr Fuglafirði, at hetta er ein virkuliga góður leikur, sum er verdur at síggja – og hann er sum nevnt bæði til gamans og álvara.

# Ikki ov fáir keyparar men stórt útboð

**– Í Danmark hugsa fiskimenn um at brúka kvotuna best møguligt. Teir hugsa eisini um prísleguna, tá ið farið verður til fiskiskap. Teir brúka ikki kvotuna bara fyri at brúka hana, men vilja vinna sum mest burtur úr henni, sigur samskiparin hjá Ráfiskakeyparafelagnum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Agnar Jensen,ið starvast sum samskipari hjá Ráfiskakeyparafelagnum, heldur ikki, at vit kunnu siga, at tað eru ov fáir keyparar á marknaðinum í Føroyum.

– Mær vitandi eru keypararnir í Føroyum einir 35 í tali, og tað er ikki so lítið, heldur hann. Agnar vísir á, at útboðið av fiski í Føroyum er rættiliga stórt í løtuni, og framleiðslu- og søluliðið hevur ilt við at avseta fiskin sum er.

– Tað vísir seg, at skipini hugsa mest um at grabba so nógv til sín sum møguligt – uttan í sama mun at hugsa um, hvør eftirspurningurin er. Tá ið so marknaðurin ikki megnar at taka ímóti meira, verður funnist at søluliðnum. Tað er lætt at skula siga tað - verri at fremja tað í verki, men tá ið marknaðurin fyri t.d. smáa hýsu er vánaligur, kundu skipini kanska lagt seg meira eftir at veiða stóra hýsu, sum meira fæst fyri.

Agnar sigur, at hann hevur starvast innan donsku fiskivinnuna, og har hugsaðu fiskimenn í størri mun enn í Føroyum um at brúka kvotuna best møguligt.

– Teir hugsaðu eisini um prísleguna, tá ið farið varð til fiskiskap – og ikki bara um veiðilíkindini. Teir brúktu ikki kvotuna bara fyri at brúka hana, sigur hann.

Agnar vísir á, at gjaldoyruni í londunum, sum serliga keypa hýsu, eitt nú Bretland og USA, eru fallin, og hetta virkar eisini negativa vegin á prísirnar.

– Ein marknaður er ofta soleiðis, at tá ið hann versnar, so fella prísirnir knappliga og ikki líðandi. Síðan plaga prísirnir at koma uppaftur, til teir leggja seg á eitt rímiligt støði.

Hann sigur, at slíkt hendir ofta um ársskiftið, og ein orsøkin kann eisini vera, at framleiðarar, sum hava goymslur, spekulera eitt sindur í hesum.

– Tað snýr seg alla tíðina um útboð og eftirspurning og harvið verður príslegan løgd, sigur Agnar Jensen, samskipari hjá Ráfiskakeyparafelagnum.



# Ellisheimið nýggjan og stásiligan buss

**Búfólk og avvarðandi á Røktar-og Ellisheiminum í Runavík hava nú fingið ein nýggjan buss til flutning av teimum gomlu og avlamnu, sum búgva á heiminum. Hetta er ein serútgjørdur bussur av slagnum, Fiat**

ELDRAØKIÐ
*Vilmund Jacobsen*

**Runavík:** Tordur J. Niclasen, leiðari á heiminum, er sera fegin um nýggja bussin, sum gevur starvsfólkunum betri møguleikar at flyta tey gomlu, har tey nú einaferð fara við teimum, bæði her heima og uttanlands.

– Inni í bussinum, sum kom stutt fyri jól, er ein lyft, og øll trygdarviðurskifti annars eru í hásæti. Hevði lyftin verið uttaná bussinum og ikki inni í honum, hevði pláss verið fyri 2-3 fólkum aftrat, men vit valdu heldur hesa loysnina.

Tordur sigur, at setur kunnu takast úr bussinum eftir einum skinnara og eftir tørvi.

– Vit halda, at nýggi bussurin, sum hevur 11 sitipláss, er sera væl egnaður til endamálið og gevur okkum veldugar møguleikar, sigur hann.

## Kári ágrýtin

Eysturoyar Røktar-og Ellisheim, sum hevur havt ein 12 ára gamlan buss, hevur í fleiri ár søkt um játtan til ein nýggjan.

– Hetta hevur gingið striltið, men eydnaðist umsíðir, sigur Tordur, sum ikki dylur, at hann er sera takksamur fyri ta ágrýtni, ið ikki minst Kári P. Højgaard, sum fíggjarnevndarlimur, hevur víst hesum máli.

Tað eru húsavørðarnir hjá Eysturoyar Røktar-og Ellisheimi, sum hava nýggja bussin um hendi, og neyðugt er við stóra koyrikortinum hjá tí, sum situr við róðrið.

Kostnaðurin av nýggja Fiat'inum er umleið 400.000 krónur, tá ið alt er íroknað.

## Uttanlandsferðir

Hvørt ár fara starvsfólk á heiminum í Runavík uttanlands við búfólkum.

Til tess at savna inn pening til hesar ferðir, verður skipað fyri regluligum bingo á heiminum. Hesi plaga at verða 14. hvønn dag ella triðju hvørja viku.

– Bæði búfólkum, avvarðandi og øðrum dáma væl at koma til hesi bingo, og ofta eru vit eini 100-150 fólk í tali sum spæla bingo, sigur leiðarin, Tordur J. Niclasen.